


# Best í 2010

**BLØÐ** OG **BLOGGAR** ERU Í HESUM DØGUM **ÍÐIN** Í AT GERA LISTAR YVIR TAÐ **BESTA** Í FARNA ÁRI. EITT BLAÐ, IÐ **SEINASTU 13 ÁRINI** HEVUR LATIÐ **SÍNAR** LESARAR VELJA BESTU **HÚÐKREM** OG SMYRSL ER **SVENSKA DAMERNAS**. ÁRSINS **LISTI** ER JÚST **KOMIN**, OKKURT ER **NÝTT**, MEN GAMLIR KENNINGAR **ERU** EISINI Á **LISTANUM**.







**Body Butter frá Body Shop.** Feita kremið hjá Body Shop er eisini ein gamal favorittur, ið regluliga kemur í nýggjum anga. Nógv dáma best "Moringa"-angan, men frukt og nøt eru eisini vælumtókt. **Mínar royndir:** Havi átt nógv ymisk Body Butter, og eru tey perfekt, tá húðin er ógvuliga turr, men eitt sindur ov feit at nýtast dagliga.

**Juicy Tubes frá Lancome.** Litríka varraglinsi Juicy Tubes var millum tey fyrstu á marknaðinum, tá tað gjørdist modernað við glinsandi vørrum. Hóast rákið hevur vent, og varrarnar ikki eru so glinsutar nú, so eru Juicy Tubes enn vælumtóktar. **Mínar royndir:** Sorry, her eri eg ósamd. Havi ongantíð skilt tað fantastiska við Juicy Tubes. Mær dámar litirnar og luktin, men haldi at tað klebrar og kennist ov feitt á vørrunum.



**Microshadow frá Make Up Store.** Nýggjasti vakurleikahandilin í Føroyum vann eisini inn á listan. Eygnaskuggarnir "Microshadow" eru at fáa í ikki minni enn 89 ymiskum litum, og tí er lætt at finna sín egna yndislit. **Mínar royndir:** Lætt at nýta, men í so dýrt fyri bara ein lit.




**Hypnose frá Lancome.** Nógv dáma hesa maskaruna best, tí at bustin er tjúkk, liturin heldur sær leingi, og vippurnar klumpa ikki saman. Í tí dýrara endanum, men varar leingi. **Mínar royndir:** Hesa havi eg ikki roynt enn, favorittarnir eru annars Diorshow og Great Lash frá Maybelline, ið er ein favorittur hjá make-up artistum.




**Eight Hour Cream frá Elizabeth Arden** feiðraði í fjør 70 ára føðingardag. Hetta krem verður nýtt til tað mesta á kroppinum - varrar, hár og húð. Grundin til navnið Eight Hour Cream er, at ein mamma, ið nýtti kremið til skursl hjá soninum, vildi verða við, at tað lekti eftir átta tímum. Eight Hour Cream er ein klassikari á slíkum listum sum hesum. **Mínar royndir:** Sovni við tí á vørrunum, nýti tað til avtiknu húðina hjá soninum og rundanum neglirnar. Lukturin er also ikki nakað serligur, men sum tað hjálpur!

**Touche Éclat frá Yves Saint Laurent.** Drotningin millum dekkstift. Tá Touche Éclat kom 1992, var hon fyrsta dekkstift, ið ikki bara lovar at goyma pirrur og skøvur, uttan eisini gevur húðini lit og javnar húðlitin. Nú verður ein Touche Éclat seld hvørt tíggjnda sekund um allan heimin. **Mínar royndir:** Keypti hetta fyri ikki so langari tíð síðani og eri einig í, at tað er avbera gott at javna húðlitin við, men dekkar ikki líka væl pirrur. Persónligi favoritturin eitur Infallible frá L'Oreal.

